## Rivaldo til Usbekistan

Eftir at tað miseydnaðist hjá Kuruvchi í Usbekistan at fáa Samuel Eto'o til felagið, hevur leiðslan nú fingið fatur í brasilska Rivaldo, sum í 1999 varð kosin eimsins besti spælari. Rivaldo er í dag 36 ár, og hann hevur seinnu árini spælt í AEK Athen. Kuruvchi hevur rindað fýra milliónir fyri Rivaldo, sum sjálvur fær eina tvísiffraða milliónaupphædd í ársløn. Hetta er tó lítið av miklum, tí ætlani skuldi Eto'o fáa um 300 milliónir krónur fyri at skifta felag



## Berbatov á beinkinum

Spanski venjarin hjá Tottenham, Juande Ramos, er eftir øllum at døma troyttur av áhaldandi slatrinum um, at Dimitar Berbatov skal vera ávegis til Manchester United. Spælarin hevur sjálvur sagt, at hann fegin skiftir, og tað fekk venjaran at seta hann á beinkin, tá Tottenham spældi um vikuskiftið. Í enskum miðlum verður gitt, at Ramos ætlar at koyra Berbatov heilt úr hópinum. Og at tað so verður upp til Manchester United, um teir vilja rinda 300 milliónir fyri spælaran, sum Tottenham keypti í Leverkusen fyri á leið 100 milliónir krónur.

# 48 útlendingar í føroys

**Tað eru í løtuni 48 útlendingar virknir í teimum fremstu deildunum í føroyskum fótbólti. Ongantíð áður hava so nógvir útlendingar spælt í bestu deildini, og tað er serliga eftur málverjum, at feløgini hyggja uttanlands**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað hoyrist ofta. At hesin og hasin bara troka yngru føroysku leikararnar av liðnum. Uttan at prógva tað, eiga flestu teirra sjálvskriva pláss í byrjunaruppstillingini. Onkur finst at einstøku leikarunum, meðan summi filast á leiðslurnar at fáa teir hendan vegin.

Men føroyskur fótbóltur hevur sanniliga havt gagn av fleiru teirra. Ion Geolgau, Krzysztof Popczynski og Tomislav Sivic eru millum útlendingarnar í føroyskum fótbólti, sum seinastu tíggju árini hava lyft støðið á fótbóltinum. Við øðrvísi hugburði og nýggjum sjónarmiðum hava teir givið leikarum far av, hvat tað krevst, fyri at sleppa víðari. Og tað skulu vit sjálvandi verða takksom fyri.

Í ár eru tað heili 48 útlendingar í føroyskum fótbólti, og talið hevur ongantíð verið so høgt sum nú. Níggju teirra eru virknir í næstbestu deildini. Hinir 39 umboða feløg í Formuladeildini.



*Fleiri av útlendsku spælarunum í føroyskum fótbólti eru úr Serbia. Ein teirra er Nenad Stankovic, sum í fjør varð kosin ársins spælari í føroyskum fótbólti*

### Væl fleiri

Tað eru fleiri dømi um útlendskar leikarar, sum eftir einum hálvum ári í Føroyum – ella minni – venda nøsini aftur móti heimlandinum. Soleiðis er eisini í ár. Tamás Nagy, Anderson, Jacob Bymar og Dejan Stojkovic eru millum teirra sum komu hendan vegin í vetur, men spæla ikki longur í Formuladeildini.

Í alt hava 44 útlendingar spælt í Formuladeildini í ár, meðan talið nú er 39. Sum sæst á tølunum aðrastaðni á hesu síðuni, so er tað hægri enn nakrantíð. Leggjast skal til merkis, at í 2001 vóru bara 18 útlendingar tilsamans í bestu deildini.

### Serliga málverjar

Tað er ikki eitt nýtt fyribrigdi, at føroysk fótbóltsfelag leita sær út um landoddarnar eftir útlendskum styrki og íblástri. Feløgini eru jú trýst. Áskoðarar og stuðlar krevja nógv, og sum tað sær út í løtuni er kappingin eisini hørð um at sleppa undan niðurflyting.

Tað er serliga eftir málverjum, at feløgini hyggja uttanlands. Í løtuni eru tað helmingurin av liðunum, sum hava ein útlending millum stengurnar. Geza Turi,

## Útlendingar í bestu føroysku fótbóltsdeildini í alt:

| 2000: | 2001: | 2002: | 2003: | 2004: | 2005: | 2006: | 2007: | 2008: |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30 | 18 | 31 | 28 | 27 | 28 | 20 | 30 | 48 |